Landssjúkrahúsið
Køkurin
Fo 100 Tórshavn

# Køksatstøðari

Til køkin á Landssjúkrahúsinum søkja vit eftir køksatstøðara á starvsbrøki 0,7 til fast starv at byrja 15. august 2005.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum køksatstøðari
- áhuga og fleksibilitet í mun til uppgávurnar
- samstarvsvilja
- sjálvstøðugleika
- ábyrgdarkenslu

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- eitt arbeiðspláss í menning
- at arbeiða saman við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Gudnu á Rógvi Joensen, leiðandi økonomu, telefon 30 45 00, lokal 1260, teldupostur gurojo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. juli 2005.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
100 Tórshavn


# Proklama

Sagt verður frá, at Føroya Skiftirættur eftir áheitan frá Skráseting Føroya hevur avgjørt við likvidatión at avtaka Sp/f Sita, Torkilsgøta 22, 100 Tórshavn (skrás. nr. Sp/f 3220), og í hesum sambandi hevur skiftirætturin tilnevnt undirritaða Petur Even Djurhuus til sum likvidator at greiða avtøkuna.

Vísandi til ásetingarnar í § 92, stk. 1 í smápartafelagslógini, verður við hesum proklama heitt á kravánarar felagsins um, innan eina freist uppá 3 mánaðir, frá tí at henda lýsing hevur verið í bløðunum, at fráboða krøv teirra við nærri skjalprógvi fyri undirritaða likvidator.

**Petur Even Djurhuus, likvidator**
Yviri við Strond 4,
100 Tórshavn
tlf. 31 12 60 · telefax 31 12 61


# Summarstevnan 2005

Árliga summarstevnan hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum verður í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík í døgunum 30. juni til 3. juli.

Gestir eru Anna og Norvald Yri úr Norra, sum áður hava verið trúboðarar m.a. í Tanzania. Norvald er bíbliuskúlalærari á Fjellhaug Skoler og Anna er lektari í sjúkrarøktarvísind á Høgskolen í Oslo.

**Hósdagur 30. juni:**
**Kl. 20.00** Møti v/ Norvald Yri: „Er kristindómurin útgingin?“ (í Emmaus)

**Fríggjadagur 1. juli:**
**Kl. 10.00** Bønamøti (í Emmaus)
**Kl. 10.30** Bíbliutími v/Norvald Yri: „Hvør er ein kristin?“ (í Emmaus)
**Kl. 16.00** Missiónsmøti (í Skúlanum við Ósánna)
Norvald Yri: „Jesus hevur alt valdið. Hvat eru fylgjurnar?“
Anna Aarsland Yri: „Haydom sjúkrahús og sjúkrasystraskúli“
Anne-Lene Olofson: „Presta- og prestakonuútbúgving í Mbeya“
Petra Nysted syngur
Innsavning til missiónsarbeiðið
**Kl. 19.30** Møti v/Norvald Yri: „Gud talar til tín persónliga“
Petur Hans & Thomas syngja

**Leygardagur 2. juli:**
**Kl. 10.00** Bønamøti
**Kl. 10.30** Bíbliutími v/Norvald Yri: „Skuldin goldin – kortini skuld“
**Kl. 16.00** Møti - Leivur Nattestad talar
**Kl. 19.30** Møti v/Norvald Yri: „Er vón fyri einum sum mær?“
Askham syngur
Innsavning til missiónsarbeiðið
**Kl. 22.00** Ungdómsmøti v/Norvald Yri: „Vilt tú veruliga til himmals?“

**Sunnudagur 3. juli:**
**Kl. 11.00** Gudstænasta við altargongd
Norvald Yri prædikar
**Kl. 15.00** Familjumøti
Børn úr Emmaus syngja
**Kl. 18.00** Felagsmøti við KFUM&K (í Christianskirkjuni)
Norvald Yri: „Enn er rúm“
Kórið í KFUM&K syngur

Møguleiki er at keypa døgurða og nátturða í kantinuni í Tekniska skúla.

Øll eru hjartaliga vælkomin!

***Kirkjuliga Missiónsfelagið***



# Hús til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin matr. nr. 204, Kollafirði seld, um hóskandi boð fæst.

Grundøkið er 786 m$^2$.

Talan er um eini gomul hús í kjallara, stovu- og loftshædd. Húsini eru upprunaliga bygd í seinnu helvt av nítjandu øld.

Kjallarin og miðhædd eru hvør uml. 68 m$^2$ til víddar. Loftið er uml. 30 m$^2$ til víddar. Í kjallaranum eru tvey rúm innrættað. Partur av kjallaranum er ikki fult útgrivin.

Stovuhædd: Durur, lítið wc v/brúsu og vaski, køkur við eldri innrætting, 3 kømur og stova.

Loftshædd: Trappuuppgongd, gongd og 3 kømur.

Frítt er frammanfyri húsini, og útsýni yvir fjørðin.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá undirritaða.

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
**Tlf. 311145**
**att: Fríða Patursson, adv.**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 215,**
P/F Føroya Tubbakssøla, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
23.06.2005
**Navn:**
**Nýtt navn:** P/F 23. juni 2005
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Bogi Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Randi Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Kári Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Marjun Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Kári Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn
**Innkomin sum likvidator:**
Christian Andreasen, adv., Fr. Petersensgøta 9, 100 Tórshavn
**Átekning:** Felagið er tann 23.06.2005 farið í sjálvbodna likvidatión

Skráseting Føroya
tann 28. juni 2005

Kristin Balle